23. juni 2006

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 4/2006

Tíð: Hósdagin 22. juni 2006, kl. 13-15.30

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Eivind Weyhe, vararektari og megindeildarráðsf. fyri FMD
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 4/2006 setursráðsfundi 1. juni 2006.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarbýti 2006.** (J.nr. 0015-01595). *Fundarskjøl: Uppskot til nýtt býti, dagfest 16. juni 06.* Setursskrivarin gjøgnumgekk uppskotið til endurskoðað býti. Uppskotið staðfest. Setursskrivstovan gevur deildunum boð um nýggja býti.

4. **Fíggjarløgtingslóg 2007.** (J.nr. 0015-01855). *Fundarskjøl: Framrokning av fíggjartørvi, dagfest 16. juni 06, skriv frá deildunum við v.v. játtan til menning, frá NVD 12. juni, frá FMD 16. juni og frá SSD 22. juni.* Setursskrivarin hevur gjørt framrokningar fyri verandi virksemi við støði í upplýsing frá deildunum. Hon ger uppskot til umsókn at senda setursráðnum til staðfestingar í komandi viku. Rektarin skrivar uppskot til umsókn um játtan til raðfestu økini í menningarætlanini. Innkomna tilfarið frá deildunum verður lagt við sum fylgiskjøl.

5. **Uppskot til løgtingslóg um fólkayvirlit frá Innlendismálaráðnum til viðmerkingar, freist at svara 10.7.06.** (J.nr. 0010-01874). *Fundarskjal: Skriv frá*

*Innlendismálaráðnum, dagfest 8. juni, 2 s og lógaruppskot við viðmerkingum 57 s.* Søgu- og samfelagsdeildin tekur sær av málinum.

6. **Nýggj heimasíða til setrið.** (J.nr. 0018-01876). *Fundarskjal: PPT framløga frá Heimasíðubólkinum – fundur kl. 11-12 sama dag.* Drúgt kjak um heimasíðuna og um miðilin sum heild. Setursráðið tók undir við arbeiðsætlanini hjá arbeiðisbólkinum og játtaði peningin, sum biðið varð um til at fullføra arbeiðið. Setursráðið er sannført um, at nýggja felags heimasíðan er eitt týdningarmikið amboð í profileringini av Setrinum og dokumenteringini av virkseminum hjá stovninum. Staðfest, at tað er neyðugt at seta munandi meira arbeiðsorku av til tilfar til heimasíðuna. Øll mugu taka síðuna til sín sum ein part av arbeiðinum. Tað hevur stóran týdning at geva frálæru í amboðnum, so øll duga at brúka skipanina. Kunningarfulltrúin skal skipa fyri regluligum fundum við deildirnar um tilfar, komandi tiltøk o.s.fr.

7. **Felags journal til setrið frá 2007.** (J.nr. 0017-01858). Setursskrivarin greiddi frá kanningararbeiðinum at finna eina felags elektroniska journalskipan fyri stovnin. Málið er ikki liðugt kannað enn, men valið kemur at standa millum InfoOrganizer, sum Føroyamálsdeildin brúkar nú og Náttúruvísindadeildin eftir ætlan skuldi verið farin undir at brúka, og DocuLive, sum flestu almennu stovnar brúka. Setursskrivarin arbeiðir víðari við málinum saman við KT-tænastuni og journalfólkunum, sum í felag gera eitt tilmæli til setursráðið til støðutakan sum skjótast. Setursráðið tók undir við at funnin verður ein felags loysn, peningur er settur av í fíggjarbýtinum til endamálið.

8. **Ársfrágreiðingin 2005.** (J.nr. 0018-01690). Eftir kjak um undanfarnar ársfrágreiðingar og arbeiðsgongdina higartil, samtykti Setursráðið, at ársfrágreiðingin ikki longri skal prentast. Tilfarið skal í staðin skrivast til og leggjast á heimasíðuna í einum snøggum sniði, sum kann prentast til tey, sum ynskja eina pappírsútgávu. Rektarin, setursskrivarin og kunningarfulltrúin gera eitt uppskot til leist fyri nýggju ársfrágreiðingina sum skjótast. Øll vísindastarvsfólk verða biðin um at gera upp útgávur, undirvísing o.l. fyri 2005 sum skjótast.

9. **Altjóðaskeið í føroyskum 3. hvørt ár.** *Fundarskjal: Skriv frá Føroyamálsdeildini 13. juni 2006, 3 s.* Setursráðið tók í prinsippinum undir við uppskotinum hjá Føroyamálsdeildini, soleiðis at næsta skeiðið verður í 2007, síðani í 2009 og so 3. hvørt ár. Hetta er tó alt treytað av at arbeiðorka er tøk til skeiðini, tá tey verða boðin út.

10. **Endurskoðan av námsskipanum á Søgu- og Samfelagsdeildini.** (J.nr. 0042-01380). *Fundarskjøl:Námsskipanir fyri søgu og stjórnmálafrøði, góðkendar á megindeildarráðsfundi 13. juni 2006, 7 og 6 s.* Deildin hevur gjørt av at broyta námsskipanirnar, so tað ikki longri verður brúkt eitt felags støðisár, men eitt felags skeið. Setursráðið staðfesti broytingarnar.

**11.** **Tilmæli um lim í Fjølmiðlanevndina.** *Fundarskjal: Skriv frá Innlendismálaráðnum, dagfest 14. juni 2006, 1 s.* Rektarin kannar málið og ger uppskot, sum verður sent setursráðnum til staðfestingar sum skjótast.

**12.** **Fundaætlan fyri heysthálvu 2006.** (J.nr. 0011-01481). Fundirnir í heyst verða: 31. august, 28. september, 26. oktober, 23. november og 14. desember.

**13.** **Kunning frá deildunum o.ø.:**

a. **Fundur á Søgu- og Samfelagsdeildini 13.6.06.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.
b. **Fundur í arbeiðsbólkinum, sum ger uppskot til nýggjan bygnað fyri Setrið v.m.** (J.nr. 0010-01822). Setursskrivarin kunnaði um gongdina higartil og um fyrsta útkast til bygnað, sum er sent nevndini.

**Avgreiðslumál:**

**14.** **Mannagongd fyri kreppuhjálp á Fróðskaparsetrinum. At staðfesta.** (J.nr. 0011-01757). Staðfest.

**15.** **Metingarnevnd til adjungerað fólk á Náttúruvísindadeildini. At staðfesta.** (J.nr. 0021-01840). Staðfest.

**16.** **Próvdómaragóðkenning. Eftir tilmæli frá Søgu- og Samfelagsdeildini hevur Mentamálaráðið góðkent Kate Sanderson, M.Phil., ráðgeva á Fiskimálaráðnum, sum próvdómara til eina próvtøku í *Siðsøgu* í juni 2006. At staðfesta.** (J.nr. 0026-01525). Staðfest.

**17.** **Góðskriving. Søgu og Samfelagsdeildin mælir til at Herleif Hammer fær avriksflutt Historisk Emneområde E, 30 ECTS frá Århus Universitet fyri Evnisøki 5, 28 ECTS á cand.phil. náminum í søgu og siðsøgu. At góðkenna.** (J.nr. 0046-0xxx). Góðkent.

**Kunningarmál:**

**18.** **Mánaðarjavni ultimo mai 2006, nýtsla fyri alt setrið 6.940.100 = 36,4% av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01595).

**19.** **Útgávur o.a.:**

a. **Grein í The Shetland Times 19.5.06 “Faroe links celebrated at Jakobsen conference”.** (J.nr. 0057-01793).
b. **Ársroknskapur 2005, Tryggingarfelagið Føroyar.**
c. **Nordisk Ministerråds Velferdsforskningsprogram, Programkomitéens sluttrapport, TemaNord 2006:521.**
d. **ANSA 1956-2006, Association of Norwegian Students Abroad.**

e. **Iceland Today, ritstjóri Jón Ólafur Ísberg.**
f. **Carlsbergfondet Årsskrift 2006.**

Frágreiðing: Annika Sølvará